


LØGTINGSVALIÐ 19. JANUAR 2008

# Sandoyartunnilin og Visjón 2015



Val

FRÍÐTÓR DEBES

Valevni Miðfloksins/ listi H

Tað er við stórum áhuga, at undirritaði hevur fylgt við orðaskiftinum, ið hevur verið viðv. Sandoyartunnlinum síðstu tíðina. Summi fyri og onnur ímóti. Fyri okkum, ið hava eitt ella annað tilknýti til oynna, er at fegnast um, at hann loksins varð samtyktur av Tinginum.

Sjálvandi vita vit, at her verður tosað um nógvan pening, ið skal nýtast til verkætlanina, men sum heild kemur hesin tunnil at gerast eitt sera stórt aktiv fyri Føroyar – ikki minst fyri sunnarapartin av landinum. Tað má væl vera endamálið at knýta so nógv av landinum saman sum gjørligt - við einum vegasambandi – har tað er gjørligt og forsvarligt. At Sandoyggin nú stendur fyri tørni er púra rætt og síðani eigur at verða hugt longur suður. Í longdini koma hesar báðar stóru verkætlanirnar at verða til stóra gleði fyri land og fólk. Ikki minst fyri trivnaðin á hesum oyggjum.

Um 15 ár so skal ein nýggjur Teisti byggjast – og uttan iva verður hann dubult so stórur sum hesin er – og kemur sostatt eisini at kosta tað tilsvarandi. Hyggja vit longur suður, so skal eisini ein nýggjur Smyril gerast fyri nógvar hundraðtals miljónir – og uttan iva eisini væl størri enn tann Smyril, ið vit kenna ídag.

Eitt sum hevur undrað meg sera nógv, er tá eg hugsi um brúnna um streymin – hvussu tað kundi bera til, at tað skuldu ganga yvir 1000 ár áðrenn vit funnu útav at gera eina brúgv millum Streymoynna og Eysturoynna. Teinurin er sera stuttur. Vit vita, at rómverjar bygdu nógvar brýr fyri 2000 árum síðani.

Nógv hevur verið tosað aftur og fram viðv. Visjón 2015 – og eiga vit sjálvandi at leggja ætlanir fyri landsins framtíð. Men leggja vit ætlanir, so mugu vit eisini leggja ætlanir, ið fevna øllum landinum.

Spell er bert, at politikarar, so seint finna út av at seta pening av til framtíðar verkætlanir – eisini tær heilt stóru og dýru. Skulu vit framhaldandi útbyggja hetta land á skipaðan hátt, so mugu vit raðfesta og seta pening av í grunnar til hesi endamál.

# Samgongan okrar láglønt



Val

BILL JUSTINUSSEN

løgtingsmaður fyri Miðflokkin

Okkara skattaskipan hevur til fyri 4 árum síðani verið sosialt innrættað. Tær hægstu inntøkurnar hava verið hart skattaðar til fyrimuns fyri tær lægstu inntøkurnar. Hetta hevur uppihildið eini ávísari javnvág millum fólk, og hevur hildið gjónni millum hálønt og láglønt í skák. Men so komu "skattareformatorarnir" á vøllin og tóku grundarlagið undan hesi sunnu skipan. Úrslitið er, at tey við vanligari arbeiðsmannainntøku standa spyrjandi og hava trupult við at fáa gerandisdagin at ganga upp, meðan tey við hægri inntøkunum hava enn meiri eftir til egna nýtslu.

**Hví er alt so dýrt?**
Dagliga fílast fólk á, at alt er vorðið so dýrt. Svarið er ikki bara, at kornprísirnir á heimsmarknaðinum eru farnir upp. Svarið er eisini at finna á heimavølli. Veruleikin er, at umleggingin av skattastiganum saman við størri inngjaldi í arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin er við til at trýsta prísirnar upp. Og tá prísirnir fara upp, fer mvg-avgjaldið eisini upp. Verandi landsstýrismaður í fíggjarmálum hevur kallað mvg-avgjaldið fyri "degressivan" skatt. Degressivur skattur snýr seg um, at øll skulu gjalda sama krónutal í skatti, uttan mun til inntøku. Mvg'ið av einum breyði er tað sama fyri øll, uttan mun til inntøku. So tá prísirnir á neyðsynjarvørum sum breyði og smøri fara upp, so bløða tey lágløntu mest. Og júst tað er hent. Tá samgongan áleggur handilsmanninum at gjalda meiri inn í samhaldsfasta og barnsburðargrunnin, má hann hækka prísirnar fyri at hava tað sama eftir. Og tá prísurin hækkar, fer mvg'ið sama veg. Sostatt hevur førdi politikkurin havt ta beinleiðis avleiðing, at verkafólkið nú skal gjalda meiri í mvg til landskassan enn áður. Og hetta sæst aftur í landskassaroknskapinum. Fyri fyrstu ferð er landskassainntøkan av mvg hægri enn av skatti. Myndin er koppað. Nú verður landshúsarhaldið í størri mun fíggjað við mvg enn við skatti. Og hetta rakar verkafólkið í ólukkumát. TÍ ER ALT SO DÝRT.

**Skal mvg'ið lækka**
Fyri 4 árum síðani kostaði eitt rugbreyð 15 krónur. Av hesum fekk landskassin 3 krónur í mvg-avgjaldi. Í dag kostar eitt breyð 28 kr. Av hesum fær landskassin kr. 5,60. Sostatt hevur landið eina eykainntøku av prísvøkstrinum. Hvør bløðir harðast av hesum? Sjálvandi tey við lægstu lønunum. Hetta er tíverri støðan á marknaðinum sum heild. Trot á arbeiðsmegi, økt almenn gjøld og annað eru orsøkir til, at flest allar vørur eru vorðnar dýrari. Landskassin fær av hesum eykainntøkur, sum ikki hava verið ætlaðar. Tíðin er helst komin til at lækka mvg-avgjaldið á øllum vørum ella á útvaldum vørum. Hesum vil Miðflokkurin virka fyri í komandi valskeiði.

# Í Føroyum skulu føroyingar ráða



Val

HANS NORÐFOSS

Valevni Fólkafloksins

Nú landstingið í Grønlandi hevur avgjørt at grønlendingar skulu siga sína hugsan um ríkisrættarligu støðuna hjá teimum, fari eg at mæla til at føroyingar fara at arbeiða miðvíst við tí sama.

Vit verða noydd at ásanna, at vit eru ikki leys av ríkisfelagskapinum fyrr enn vit hava loyst okkum fíggjarliga, og skulu vit verðuliga, uttan at tann fíggjarliga støðan ávirkar, á val um ríkisrættarligu støðu Føroya, so mugu vit fyrst loysa tað bandið, sum bindir okkum og ríkisfelagskapin.

Hettar kann gerast við eini búskapasemju sum helst allir flokkar á tingið kundu tikið undur við. Fólkaflokkurin mælir til eina búskaparsemju sum sigur at fyri hvørja krónu vit gera okkum meira fíggjarliga óheft av ríkisfelagskapinum, ja so nýta vit eina krónu uppá størri vælferð í landinum.

Hesa semju og tað at vit arbeiða fyri at blíva óheft av ríkisfelagskapinum, vil eg á tingið arbeiða fyri.

Í Føroyum skulu føroyingar ráða.

**Gott val**

# Hava stillararnir fingið nýggjársheilsan?



Val

EIVIN JACOBSEN

Sambandsflokkurin

19. januar skulu 171 valevni upp á skafottið, 33 koma heilskapað niðurav aftur. Persónliga hevur undirritaði einki ímóti um tey, sum tóku undir við Føroyum, sum eitt valdømi, hoyra súsið frá guillotinini.

Nógv hevur verið tosað um Føroyar sum eitt valdømi. Gongdin gjørdist,sum fleiri høvdu roknað við, ongar greiðar viðtøkur um , hvussu fram skal farast. Tvørturímóti bendir nógv á, at fleiri nú hava fingið kaldar føtur.

Ein av mongu broytingunum eru stillararnir. Fyri nógvar hevur hetta verið ein heiður, at verið stillari fyri sín flokk. Í fleiri førum hevur hetta gingið í arv, og ikki sørt av hátíðardámi var, tá formenninir fyri valfeløgini fóru runt og bóðu um undirskriftina.

Álitið avspeglaðist sjálvandi, at viðkomandi persónar føldu tað sum sína skyldu at stuðla sínum flokki, ella valevni, og her sveik álitið ikki.

Hetta er søga í dag. Teir 10-15 stillararnir úr hvørjum valdømi eru nú blivnir 10-15 um alt landið.

Tí er mín spurningur: Hava tit fingið nýggjársheilsan frá teimum, sum tóku undir við Føroyum, sum eitt valdømi? um ikki, so skal eg geva tykkum hana fyri trúgva tænastu ímóti flokkinum.

# Brúk fyri øllum



Val

ÓLAVUR HANSEN

Fólkaflokkurin

Lógin um almannapensjónir verður broytt so at fólka- og fyritíðarpensionistar kunnu fáa meiri burturúr lønarvinnu. hetta verður gjørt við at hækka upphæddina, sum loyvt er at forvinna skattafrítt oman á pensiónina. Eisini verður mótrokningin í pensjónini av aðrari inntøku minkað munandi.

Tað skal altíð loysa seg at arbeiða.

Altjóða sáttmáli um rættindi hjá fólki við breki verður settur í gildi fyri Føroyar. Virkast skal miðvíst við proaktivum tiltøkum til at skapa betri arbeiðs- og inntøkumøguleikar fyri fólk við skerdum førleika.

Eyka barnastuðul skal veitast støkum uppihaldarum, so hesir ikki rýma av landinum.

Fólkið í landinum er virðismesta tilfeingi okkara, og tí er sera umráðandi, at øll hava góðar møguleikar at fáa góða útbúgving. Meginreglan má vera, at játtanir til útbúgving fylgja næminginum og ikki skúlanum.

Útbúgvingin í fólkaskúlanum skal byggja á kristna siðalæru og føroyska mentan.

Hvør skúli skal hava meiri frælsi til at leggja virksemið til rættis innan egnan fíggjarkarm, sum inntøka frá næmingatilgongd gevur møguleika fyri. Játtanin skal tí fylgja barninum.

Virkast skal fyri, at øll kunnu fara í forskúla.

Miðnáms- og framhaldsútbúgvingar skulu lagast til føroyska vinnu- og tænastutørvin – og verða góðkendar uttanlands. Læraraútbúgvingin verður umskipa til lesnað á lærdum háskúla.

Hesum vil fólkaflokkurin eisini arbeiða fyri.